

Børnini í Stórustovu eru sera spent til jóla. Og tey hava úr at gera í barnagarðinum til jóla við bæði einum og øðrum. Tó halda tey, at tað er ræðuliga longi at bíða

Mynd: Bárður Lydersen

# Vit eru so spent til jóla…

**Børnini í Stórustovu í Dr. Margrethubarnagarðinum í Klaksvík eru, sum øll onnur børn í hesum døgum, sera spent til jóla. Tey stákast við mangt og hvat fyri at stytta um bíðitíðina. Bakstur til jóla, dansa jólatræ og ikki at gloyma jólagávurnar. Øll vita tey tó, hví vit halda jól**

JÓL
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Inni í Stórustovu er heitt og hugnaligt. Jólatónleikur streymar út úr hátalarunum. Børnini sita og spæla við ymiskt. Tey hava ein serstakan spenning í andlitinum, og tað sást á teimum, at tey eru spent til jóla.

Annika, Karin, Torgeir, Harriet og Lisa eru sera prátingarsom. Tey greiða frá onkrum loyniligum, sum tey eru í ferð við at gera í barnagarðinum. Okkurt um onkra gávu, sum man bara ikki má siga nakað um.

– Tað er ordiliga hemmiligt, sigur seks ára gamla Annika og læsir varrarnar saman. Og harvið er greitt, at tað nyttar onki at spyrja, tí tað er loyniligt, so sigur man ikki nakað.

– Hygg, vit hava blinkiperur, sigur Lisa og peikar á vøkru ljósketuna, sum hongur um eina lampu inni í Stóru-stovu.

## Piparnøtur eru best

Lítla løtu eftir, at Sosialurin er komin á gátt, fara tey yvir í køkin at baka. Serliga genturnar tosa nógv um køkur og slikk, sum jú hoyrir jólunum til.

Piparnøtur eru nakað, sum teimum øllum dámar sera væl. Í dag baka tey tó ikki piparnøtur.

– Eg og mamma bakaðu eplakøku ein dagin, sigur Karin, sum eisini er seks ár.

– Mammusa piparnøtur í ár, smakkaðu nógv betur enn fyri tveimum árum síðani, sigur Annika, meðan hon snerkir eitt sindur. So smílist hon og sigur, at tær helst fara at baka meira, tá tað nærkast jólunum meira.

Og sjálvandi tosa tey eisini nógv um jólagávurnar, sum helst ikki verða so fáar í tali. Dreingirnir ynskja sær serliga bilar og action menn í jólagávur, meðan genturnar ynskja sær dukkur og klæðir. Barbie er sjálvandi á ynskilistanum.

Hetta eru øll børn, sum fara í skúla komandi summar, so onkur væntar, at ein skúlataska ella pennahús fer at liggja undir trænum.

Spurd, um hví vit halda jól, eru tey øll skjót at siga, at tað er tí, at Jesus var føddur.

## Fleiri kalendarar

Børnini tosa um teirra jólakalendarar. Summi hava fleiri. Sukurlátakalendara og pakkakalendara.

– Eg havi fýra. Tríggjar heima og so ein pakkakalendara hjá mostur, sigur seks ára gamli Torgeir, meðan hann vísir við fingrunum, hvussu nógv fýra er.

– Eg veit, hvussu nógvir dagar eru eftir til jóla, sigur seks ára gamli Ári brádliga og reisir seg upp. Og so rópar hann 16. Og tað heldur hann er ræðuliga longi.

Í Stórustovu hava tey eisini ein jólakalendara. Tað er ein øðrvísi kalendari. Nógvar myndir, sum børnini sjálvi hava litað, hanga uppi á vegginum. Ein mynd fyri hvønn dagin. Og so taka tey eina mynd niður.

– Mín kalendari er longu tikin niður. Eg hevði nummar eitt. Skal eg siga tær, hvat tað var, spyr Karin, og so tekur hon hendurnar upp fyri munnin og flennir.

– Ein jólavættur, sum flúgvaði á eini gás.

Tá børnini hava tikið eina mynd niður, verður ein søga lisin fyri teimum. Hetta er ikki ein søga, sum passar til myndirnar, men ein framhaldssøga, sum teimum dámar avbera væl.

## Jólavættur skrivar

Børnini í Stórustovu plaga at fáa bræv frá eini jólavættur. Hendan jólavættur skrivar teimum eitt stutt bræv, har hon biður tey gera eitthvørt til jóla.

Hendan dagin stendur í brævinum, at tey skula heingja eina hosu upp, so at vætturin veit, hvar hon skal koyra allar gávurnar.

Longri niðri í brævinum stendur, at hon fegin vil hava børnini í Stórustovu at gera jóladekoratiónir. Og tað eru tey spent til.

Annars hava fleiri av børnunum longu sæð jólamannin í ár. Og tey vænta, at hann kemur á vitjan, tá tey fara at dansa jólatræ í barnagarðinum.



Smákøkur skulu bakast til jóla, og børnunum dámar avbera væl at stákast í køkinum. Hendan dagin baka tey onkrar jólaligar smákøkur við marengs

Mynd: Bárður Lydersen













